tað undarliga ella vidundarliga kann ein siga í hesum tíðum, nú tað stendur so skarpt millum Noreg og Danmark, at alt fólkið reisti seg og standandi hoyrdi hin norska nationalsangin verða sungnan. Hetta var symbolskt. Tað var hitt føroyska hjartablóðið, ið ornaði móti frændum okkara.

Teir danskarar, ið við vóru, høvdu óivað ein undarligan smakk í munninum, men teir tordu ikki at demonstrera. Eingin danskur embætismaður var við til konsertina. Amtmaðurin, sorinskrivarin og fysikus, eru ofta við til livandi bíløt, tá Mary Pickford, Douglas Fairbanks ella okkurt av hesum "døgnflugu" menniskjum eru at sjá á løriftinum. Teir hirdu ikki at koma við til eina slíka kunstprestatión sum hesa.

Men tað var tann norska smittan teir ræðast. "Die dumme danen." Tað var eitt tað fyrsta, ið hoyrdist, tá liðugt var: "Eingin danskur embætismaður var við." Bert Ludvigsen bankastjóri, hann var við. Messenschmidt er burtur.

## Stríðið millum Danmark og Noreg um Eysturgrønlandi

Hesin spenningur millum Danmark og Noreg, sum her verður umrøddur, man vera í samband við stríðið teirra millum um Eysturgrønland.

Stríðið var um økið millum 71° 30' og 75° 40' N við eini norskari radiostøð í Grønlandi.

Í 1921 boðaði Danmark frá, at alt Grønland skuldi vera undir donskum harradømi. Hetta var ein fráboðan sum norska stjórnin metti gera seg inn á norsk rættindi vegna norsku kópa- og hvalaveiðumenninir, sum veiddu í Eysturgrønlandi. Noreg roknaði Grønland sum gamalt norskt land og viðurkendi ikki, at Danmark hevði ræði yvir tey óbygdu økini í Grønlandi. Tá Danmark boðaði frá eini kanningarferð til norsku økini í 1930 gjørdist støðan spentari. Tann 27. juni 1931 hersetti ein norsk deild við fimm monnum, leidd av norska fangaranum Hallvard Devold, umrødda økið.

Vísandi til Eirik Reyða, sum uppdagaði Grønland í 985 og undanfarin norsk stýri í Grønlandi kallaðu norðmenn økið fyri land Eiriks Reyða.Hertikna økið lá fleiri túsund kilometur frá donsk øki, har fólk búði.

Noreg hersetti alment økið 1932-1933. Men Danmark stevndi Noreg inn fyri altjóða dómstólin í Haag. Hann avgjørdi í 1933, at økið skuldi vera danskt. Økið sum síðan fekk navnið Land Kong Christian X, er nú ein partur av tjóðarpark Grønlands. Helge Ingstad, sum var leiðari av eini veiðuferð til økið 1932-1934, var sýslumaður í hesum stutta hersetingartíðarskeið. Tað er greitt, at hetta mál skapti illstøðu millum Danmark og Noreg í nógv ár.

Men tað forvitnisliga er partvíst, at hetta kundi fáa ávirkan millum donsku embætismenninar til eitt slíkt tiltak sum hetta.

Tað kann sigast at vera eins løgið, at føroyingar eftir hesum at døma nýta høvið við eina slíka konsert til at stuðla norðmonnum í hesum stríði.

Hetta javnaði seg aftur sum frá leið. Danir sendu Henrik Kauffmann til Noregs sum sendimann. Hann royndi sum plástur á sárið at útvega norðmonnum útróðrarstøðir í Vesturgrønlandi.

Kauffmann kom seinni at skriva aðra søgu. Sum danskur sendimaður í USA undir krígnum "avreiddi" hann Grønland til amerikanarar. Fyri hetta var hann fyrst roknaður sum landasvíkjari, seinni sum hetja, men tað er ein heilt onnur søga.

## Umborð aftur á Mercur

Skiparin á Mercur hevði givið sangarunum ordrar til at vera umborð klokkan 8, tá skuldi vera liðugt at lossa. Teir fóru tí beinanvegin oman á Kongabrúnna. Halvorsen ynskti sær so fegin eina føroyska húgvu. Eg sprakk tí oman eftir mínari og niðan aftur í skúlagarðin við henni. Hann vildi endiliga hava hana á høvdinum, meðan teir marsjeraðu oman. Allur riðilin av fólki fylgdi eftir teimum. Eg ætlaði mær ikki umborð men stóð longri uppi á Kongabrúnni og tosaði við tveir norðmenn. Tá róptu tey, sum stóðu niðast á brúnni, til mín, at teir bíðaðu mær í bátinum og spurdu eftir mær. Eg fór so oman og inn í bátin. Tað var Halvorsen, sum vildi hava meg við. Tann deiligi Halvorsen!

Janus Djurhuus var við í bátinum. Tá Halvorsen, Hammer og eg vóru inni í bókahandlinum aftaná, at teir høvdu verið uppi hjá mær við 2-tíðina, keypti eg tvey eintøk av Janusar yrkingum. Eg skrivaði so í bøkurnar: "Til venlig erindring o.s.v." og tók tær við umborð kl. 4. Halvorsen var ógvuliga glaður fyri hesa bók, tí yrkingar á føroyskum interessaði hann ófført. Hann hevði um fyrimiddagin givið mær bílæt av sær við "eginhendigari" dedikatión á. Nú var hann komin í hóslag við Janus skaldið, og sjálvsagt beyð hann honum umborð, og sjálvsagt var Janus í essinum.

Inni í roykisalongini á Mercur samlaðist nú hópur av sangarum. "Black og White" og Selters treyt ikki, og Halvorsen setti seg at spæla uppá "handorgul." (hamoniku), tað var jubil. Hann spældi einar tveir, so gav hann tað frá sær til annan, sum var fult so kringur. Uppaftur ein annar spældi munnharpu, summir sungu, summir steppaðu og gjørdu kommers og restin flenti. Summir royndu at práta, men tað bar ikki væl til fyri øllum kætinum, men harmleysur og óskyldigur var stuttleikin. Við tað borðið, har eg sat, vóru Halvorsen, Sohlberg og Janus Djurhuus. Seinni kom Knud Knudsen til. Talur vóru hildnar og sangir sungnir.

Klokkan var um 11,30, tá vit fóru í land. Vit mundu ikki sloppið frá teimum, so blíðir vóru teir. Hurráróp rungaðu frá báðum pørtum, og hesin vakri dagur var endaður.

 Eg var troyttur, tá eg kom til hús av øllum vasanum og upplivilsunum hendan dag, og tað var so vælgerandi at leggja seg niður, har teir kæru ungarnir lógu og svóvu so søtt við rósum á kinn.

## Mercur kemur aftur

Leygardagin 19. juli kom Mercur aftur úr Íslandi. Nú var glitrandi sól. Til alla vanlukku var skipið nú sperrað. Eingin slapp í land, tí meslingar og barnalammilsi skuldu ganga í Íslandi. Vit fóru tí út til skipið og lógu har og prátaðu við teir. Halvorsen og eg tóku í hondina á hvørjum øðrum gjøgnum eitt kúgveyga.

Steðgurin var ikki langur, okkurt um 1½ tíma. Teir sungu fýra sangir. Meðan teir sungu tann seinasta, hivaði Mercur akkerið inn, og Sohlberg stóð í "røk og damp", meðan hann sang sína síðstu solo: Ja, brenn du varde, du signede kaare."

So sigldi Mercur, og hurrárópini rungaðu, og tær seinastu heilsanirnar vóru róptar. So veittraðu vit til hvønn annan, so leingi, vit kundu skilja.

**Komandi partur**
Tað er uttan iva tilfar til enn eina Miðviku um Petur Alberg, sum kann koma seinni. Men komandi partur verður um tveir syðrugøtumenn, sum vóru við til at skriva søgu. Annar er Jóan Jákup Petersen í Ólastovu, sum var ein av niðursetumonnunum í Rituvík. Hin er Absalon Jacobsen á Skála, sum gjørdist framúr vinnulívsmaður


*Frá 1900. Kvinnan á myndini verður søgd vera "Færøernes eneste kvindelige student." Hvør man hon vera? Menninir eru danir*


*Frá 1900. "Baldamer fra Festen i Thorshavn." Ber nakar kenslu á nakra?*


*Gongin í 1900. Kennist nakar við hesar dreingir?*

Sosialurin